# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Fróðskaparsetur Føroya:

## Bachelorprógv sum KT-frøðingar

Fríggjadagin 3. februar 2006 fingu tríggir studentar á Fróðskaparsetrinum handað bachelorprógv sum KT-frøðingar. Síðani útbúgvingin fór í gongd á heysti 2002 hava tilsamans 14 studentar fingið hetta KT-bachelorprógv á setrinum.

Útbúgvingin er skipað sum hálvtíðarlestur og er ein framhaldsmøguleiki hjá teimum, ið hava tikið teldustøðingaprógv (datamatikaraprógv) frá t.d. Føroya Handilsskúla. Stórur partur av lestrinum er farin fram við verkætlanararbeiði, sjálvlestri og elektroniskum stevnum. Við hesum lestrarleisti hava studentarnir kunnað verið virknir í vinnulívinum, um somu tíð sum teir taka eina universitetsútbúgving.



Teir nýklæktu KT-frøðingarnir, Magni Brøðraberg, Dánjal S. Adlersson og Bjørn E. Thomsen, høvdu valt telduspøl sum verkevnið í bachelorverkætlanini. Á samkomuni høvdu teir stutta framløgu um teirra verkætlan, sum hevði heitið 'Tann stóra námsferðin'.

Rektarin á Fróðskaparsetrinum, Jóan Pauli Joensen, handaði teimum trimum bachelorprógvið.

*Teir nýklæktu KT-frøðingarnir Magni Brøðraberg, Dánjal S. Adlersson og Bjørn E. Thomsen*

## Andlát og jarðarferðir

**Amalia Højsted, Langasandur**, ættað úr Dali, andaðist á Eldrasambýlinum í Kollafirði leygardagin 4. februar, 85 ára gomul. Jarðarferðin verður í kirkjuni í Haldarsvík mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Amaliu, kunnu lata eina peningagávu til Eldrasambýlið í Kollafirði, konta í Føroya Sparikassa.

**Pauli Túgvustein Danielsen**, lítli sonur til Gunnleyg Túgvustein Danielsen á Nesi og Geyr Müller Johannesen í Vestmanna, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 4. februar. Jarðarferðin verður úr heiminum á Gaddavegi 10 á Nesi mikudagin kl. 15. Sungið verður úr sálmabókini.

**Teddy Michelsen, Tvøroyri**, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin 4. februar, 77 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13 úr Salem á Tvøroyri. Tey, ið vilja minnast Teddy, kunnu lata eina gávu til Salem Tvøroyri, konta í peningastovninum.

## Eitt nýtt skjótiár fyri framman

**Nú dagarnir leingjast og veðrið batnar, kyknar eisini órógvin í fingrunum á teimum kvinnum og monnum, ið íðka leirdúgvuskjóting. Henda ítrótt, ið enn hevur ein avmarkaðan luttakaraskara, má sigast at ganga einum spennandi og avbjóðandi ári í møti**

SKJÓTING

Sum kunnugt hevur Sunda Byrsufelag við Norðskála verið støðugt virkið seinastu árini, og skarin av virknum limum gerst alsamt størri. Felagið skipar árliga fyri tí vælumtóktu veðrakappingini, har høvuðsvinningurin er ein livandi veðrur, latin av Føroya Bjór.



*Vinnarin av veðrakappingini 2005, Marius Joensen úr Sunda Byrsufelag, ið eisini skjeyt seg til eitt heiðursmerki á Oyggjaleikunum í Hetlandi, er her avmyndaður við vinningi sínum. Tað er Marius til vinstru á myndini.*

*Myndina: Rúni Debes*

Eftir fleiri ára oyðimarkagongd røkist nú fyri, at Veiðifelagið Byrsumúli, ið heldur til í Sandvíkum í Tórshavn, endiliga fær loyvi til at byrja virksemi teirra aftur. Har hevur alt virksemið ligið stilt í mánaðir og ár, orsakað av, at almennir og kommunalir instansir ikki hava kunna funnið eina semju um, hvørs tað skuldi verða loyvt at skjóta har ella ei, men tykist tað nú, sum um at málið endaliga er loyst, skjótingini til frama.

Sum nakað nýtt hava skjúttar í Nólsoy tikið stig til at stovna skjótifelag har.

Teir hava útvegað økið og byrjunarútgerð, og vóna at verulig gongd kemur á felagið í 2006. So hvør veit, um ikki møguleiki verður at luttaka í Fredriks-Cupinnan stutta tíð.

# Tøkk

Tøkk fyri sýnda samkenslu tá okkara kæra mamma, vermamma og omma

**Bodil Ellendersen,**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til øll, ið fylgdu, tøkk fyri blómur og heilsanir.
Tøkk tit, ið hjálptu til við jarðarferðina og ervið og tøkk tit, ið stukku inn á gólvið.

*Familjurnar vegna*

**Eyðun, Inga og Systi**

**60 ár**
Mánadagin 13. februar fyllir Edda Gaard, Vágur, 60 ár. Dag-urin verður hildin í »Framtíðini« leygardagin 18. februar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Eddu við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 10. februar á jakgaard@kallnet.fo ella tlf. 310038 eftir kl. 19.00.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vístu samkenslu, tá ið okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Hentze Joensen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk øll tit, ið á ymiskan hátt hjálptu til.
Og tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Jeanetta, Karolina, Páll, Henning og Elitha.**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæri pápi, verfaðir, abbi, langabbi og oldurabbi okkara

**Hans Jacob Justensen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Akurin.
Og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Maria, Karin, Sigrun, Eydna, Hjørdis, Gunnvør og Heidi**

**Dagurin í morgin**

**8. februar. Korinta**, deyð umleið ár 250. Kristin kvinna í Aleksandriu, sum ikki vildi ofra til heidnar gudar og tí varð tikin av døgum.